

*Bergur Jacobsen, prestur, var komin langa vegin til Jútland 2. sunnudag í advent at prædika jólaboðskapin fyri føroyingum í Holme kirke.*

henda so nógvar broytingar, og tøkniligu betringarnar eru øgiligar mestsum dag um dag.

Í dag liggur ræðið fyri at tosa umvegis internetið fyri sera lagaligan kostnað, og omman og abbin í Føroyum hava ongantíð ferðast so ofta, sum tey gera í løtuni.

Hví so senda jólaheilsanir í útvarpinum?

Flestu svørini, vit fáa, eru, at tað er nakað serligt. Nú hevur tann ella tann verið vanur við í so mong ár at pynta jólatræið og lurta eftir jólaheilsanum, og tað hevði verið illa dámt, um tað einki var at lurta eftir í ár. Og so er tað eisini nakað serligt og hugnaligt yvir tí at senda jólaheilsanir.

Áhugin fyri at senda jólaheilsanir í Århus í ár er nógv minkaður, men spurningur er, um tað ikki meira skyldast, at tað hevur ligið illa fyri hjá fólki at komið ella kunningin ikki hevur verið nóg góð. Hetta er ikki tann ringasti mátin at nýta dagin - da de dovne får travlt - til.

Tað er tó eingin ivi millum fólkini, ið dúgliga skrivað navn eftir navn og pappírið fyri at fáa øll við, at tað er óføra gott at sleppa framat

## Bara stuttligt

Fyriskiparnir av jólahaldinum í Holme kirke eru hjúnini Bárður og Laila Kass Nielsen. Tey búgva ikki langt burturi í sunnara partinum av Århus, í Viby. Vanliga taka tey sær av sunnudagsskúlanum fyri føroyskum børnum í føroyingafelagnum í Århus.

Seinastu trý árini hava tey eisini fyriskipað jólafestina og harvið staðið fyri at fáa jólaheilsanirnar frá føroyingum í Århus økinum til Føroya.

– Vil velja at gera hetta, tí vit halda tað vera stuttligt. Tá ið vit eisini hava sunnudagsskúla, er tað rættiliga nærliggjandi at skipa fyri jólahaldinum, sigur Bárður Kass Nielsen, sum hendan dagin reikar aftur og fram í besta sunnudagsuniformi fyri at øll skulu hava nokk av øllum.

Sjálv eru Bárður og Laila virkin í Føroysku fólkakirkjuni, men tey halda so avgjørt ikki, at tiltakið avmarkar seg til nakra ávísar samkomur.

– Tað vísir seg, at tá fólk koma úr Føroyum, so merkir tú ikki so væl til uppbýtingina millum samkomur, sigur Bárður Kass Nielsen.

Hann letur so avgjørt ikki illa at stríðinum, og tey bæði ætla eisini at standa fyri tiltakinum komandi ár. Tað trýtur tíðanverri upp á føroyskar urguleikarar í økinum, og tískil fer tann danski urguleikarin við størsta pettinum av fíggjarætlanini.

– Tað plagar ikki at vera nakar trupulleiki at fáa fólk at baka og hjálpa til tann dagin, tá jólahaldið og gudstænasta eru. Restina av fyrireikingunum taka vit okkum av, sigur Bárður Kass Nielsen.

At senda jólaheilsanir er einki nýtt fyribrigdi, og tiltakið í Holme kirke hevur verið fyriskipað á líknandi hátt í øllum førum í tíggju ár. Seinnu árini er tað vorðið fyriskipað í alsamt størri samstarvið við Føroyingafelagið, og nú er tiltakið at rokna sum partur av virkseminum hjá føroyingafelagnum í Århus.

Í ár var áhugin fyri tiltakinum og jólaheilsanum eitt sindur minni í mun til undanfarin ár. Kortini vóru eini áttati fólk komin saman. Fyrireikarnir eru tó væl nøgdir, men eru eitt sindur kedd um, at tað ikki eydnaðist jólamanninum at sleppa av við allar sínar pakkar.

## Byrjaði í tretivunum

Søgan um føroyskar jólaheilsanir gongur nógv longur enn tíggju ár aftur í tíðina. Vit skulu leita ein heilan mansaldur aftur í tíðina, til tretivuni, fyri at finna tær fyrstu føroysku jólaheilsarnar í Útvarpi.

Jógvan Arge, programleiðari í Ùtvarpi Føroya, sigur, at Danmarks Radio sendi føroyskar jólaheilsanir á Kalundborg langbylgju frá tretivunum og til einaferð í sekstiárunum.

- Tá var eitt føroyskt útvarp komið, og tískil helt Danmarks Radio ikki, at tað var nøkur orsøk til at halda fram við at senda jólaheilsanir. Síðani hevur Útvarp Føroya sent jólaheilsanir á hvørjum ári.

Av fyrstan tíð var tað øgiliga væl umtókt at senda heilsanir, men áhugin var nógv minkaður í áttati- og nítiárunum, men tá fólk í hópatali fluttu av landinum orsakaðu av kreppuni miðskeiðis í hálvfemsunum, so vaks talið av jólaheilsanum rættiliga nógv.

Í skrivandi stund veit Útvarp Føroya ikki at siga, hvussu nógvar heilsarnar vera í ár, men tað verður mett til at røkka til tríggjar kvøldsendingar.

Hvør er orsøkin, at Útvarp Føroya heldur fram við at senda hesar góðu jólaheilsanir?

– Tað er tí, at fólki dámar at senda heilsanir, og vit hava eisini fingið greiðar ábendingar um, at hetta er nakað, sum fólki dámar at lurta eftir, sigur Jógvan Arge.

Ársins jólaheilsanir úr Århus verða at hoyra í Útvarpi føroya ein av síðstu døgunum undan jólum. Útvarpið byrjar eftir ætlan 20. ella 21. at senda jólaheilsanir frá føroyingum úr flest øllum heimsins hornum, og tær síðstu heilsanirnar verða sendar tollaksmessukvøld.



*Jólamaðurin slap ikki av við allar sínar pakkar til børnini, men hann ætlar sær at koma aftur næsta ár við enn fleiri*